**9. Fylgiskjal I:**

# LANDSGRANNSKOÐANIN

Upprit

um umsiting

av ymiskum stuðulsjáttanum

undir

Mentamálaráðnum

Oktober 2007

---

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo
WWW.LG.FO

# Innihaldsyvirlit

1 INNGANGUR 115

2 ALMENT UM VEDDINGARPENINGIN FRÁ A/S DANSKE SPIL 115

3 ÍTRÓTTASAMBAND FØROYA 119

4 FØROYA UNGDÓMSRÁÐ (FUR) 123

5 MENTAMÁLARÁÐIÐ (TILTØK FYRI BØRN OG UNG) 127

6 YMISKIR STUDNINGAR 7.24.1.13. 131

7 TÓNLEIKUR OG SANGUR 7.24.2.01. 135

8 SJÓNLEIKARHÚS 7.24.2.16. 137

9 MENNING AV MENTAN OG MENTANARARVI 7.24.3.20. 139

10 HUGASAMBAND FØROYA 7.24.6.08. 141

11 ÍTRÓTTAANLEGG 7.24.6.12 143

12 VIÐMERKINGAR 145

# 1 Inngangur

Landsgrannskoðanin hevur kunnað seg gjøllari um umsitingina av ymiskum stuðulsjáttanum undir Mentamálaráðnum og hevur í hesum sambandi eisini kannað roknskapir hjá stuðulsmóttakarum.

Á høvuðskontu 14.3.07. "Ítróttavedding", undir innlendismálum, er í 2006 ein inntøku- og ein útreiðslujáttan, sum eru eins stórar, 8.500 t.kr. Talan er um ætlaðar inntøkur av føroyska partinum av yvirskotinum frá Danske Spil A/S, ið verða goldnar Sp/f Ítróttavedding, ið síðani býtir peningin, sum ásett í lóg.

Sambært § 10 í Ll. nr. 34/1999 "um ítróttavedding v.m." v.s.b. áliggur tað landsgrannskoðaranum og ríkisgrannskoðaranum at hava eftirlit við, at árliga avlopið hjá Sp/f Ítróttavedding verður brúkt almannagagnligt.

Í hesum sambandi bóðu vit Mentamálaráðið útvega Landsgrannskoðanini nakrar roknskapir og grannskoðanarfrágreiðingar, og niðanfyri verður greitt frá gjøgnumgongd okkara.

# 2 Alment um veddingarpeningin frá A/S Danske Spil

## 2.1 Býtið av veddingarpengunum

Í § 6 A, stk. 1, í lógarkunngerð nr. 464 frá 18. mai 2006 "Lovbekendtgørelse af lov om visse spil, lotterier og væddemål" er m.a. ásett, hvussu yvirskotið verður at býta. Meginparturin fer til danskar ráðharrastovur at umsita, men sambært § 6 A, stk. 2, fáa Grønland og Føroyar "*overskud af spil, der foregår på Færøerne og i Grønland.*"

Sambært § 7 í lógarkunngerðini rindar Danske Spil A/S yvirskotið til Finansstyrelsen, sum síðani rindar Gjaldstovuni føroyska partin av yvirskotinum.

Sambært § 6 í lógarkunngerðini *"fordeles overskuddet fra spil på Færøerne og i Grønland af de respektive landsstyrer til almennyttige formål."*

Í uppruna uppskotinum til løgtingslógina um "ítróttavedding v.m." var í § 9, stk. 2, ásett, at nevndin fyri Sp/f Ítróttavedding gjørdi av, hvussu peningurin varð nýttur. Eftir uppskoti frá Rættarnevndini varð henda áseting tikin burtur í samtyktu lógini, við teirri grundgeving at leiðslan í ÍSF, Føroya Ungdómsráð (FUR) og landsstýrismaðurin skuldu gera av, hvussu peningurin skuldi verða nýttur.

Eftir at sett er av til fyrisiting, skal felagið sambært § 9, stk. 1, í lógini býta peningin soleiðis:

- 60% til ítróttaendamál (ÍSF)
- 20% til barna- og ungdómsendamál (FUR)
- 20% til landsstýrismannin í mentamálum at stuðla ymiskum barna- og ungdómsarbeiði.

Finansstyrelsen flytur veddingarpeningin til Innlendismálaráðið/Gjaldstovuna, sum sendir peningin víðari til:

1. ÍSF, ið býtir partar av peninginum út til undirliggjandi feløg,
2. FUR, ið býtir partar av peninginum út til undirliggjandi feløg,
3. Mentamálaráðið, ið játtar stuðul til feløg og einstaklingar (Høvuðskonta 7.24.1.05. "Tiltøk fyri børn og ung").

Eftir okkara tykki er tað ikki skilagott, at 2 landsstýrismenn/aðalráð hava ábyrgd av veddingarpengunum. Tá ið Mentamálaráðið sjálvt umsitur ein part av pengunum, og hinir partarnir fara til endamál, sum hoyra undir Mentamálaráðið, hevði tað verið

greiðari, um Mentamálaráðið hevði alla ábyrgdina. Landsgrannskoðanin bað í juli 2007 landsstýrismannin í mentamálum um viðmerkingar til hesi sjónarmið.

Í september 2007 svaraði landsstýrismaðurin, at Mentamálaráðið kann geva Landsgrannskoðanini rætt í, at tað ikki er heppið, at tvey aðalráð umsita veddingar-peningin, uttan tó at siga, at tað skal verða Mentamálaráðið, ið umsitur økið.

Býtið av stuðlinum er ásett í lógini. Landsgrannskoðanin ivast í, um nøkur meining er í at lata eitt partafelag býta stuðlin sambært ásetingum í lógini. Tað kundi Føroya Gjaldstova tað sama gjørt beinanvegin.

Sambært roknskapinum hjá Sp/f Ítróttavedding eru útreiðslurnar í 2006 til at umsita felagið 390 t.kr. Seinastu 5 árini eru samlaðu fyrisitingarútreiðslurnar um 2 mió.kr., sum kundu verið betur brúktar.

Í september 2007 boðaði landsstýrismaðurin í mentamálum frá, at Mentamálaráðið er samt í, at loysnin við partafelagnum bert er ein dýrkandi millumliður, ið kann verða spardur burtur.

## 2.2 Gjøllari reglur um roknskap og grannskoðan ikki ásettar

Í § 7 B í umrøddu lógarkunngerð 464/2006 er ásett: *"Det enkelte ressortministerium og hjemmestyrene* ***fastsætter nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision*** *med hensyn til midler, som efter §§ 6 B-6 I fordeles til private organisationer. Til brug for Rigsrevisionen kan ministerierne og hjemmestyrerne indhente yderligere materiale til en nøjere regnskabs-gennemgang."*

Sambært § 10 í Ll. nr. 34/1999 *"hava landsgrannskoðarin og ríkisgrannskoðarin eftirlit við, at tann í § 9 nevndi peningur verður brúktur almannagagnliga, og hava teir í starvi sínum neyðuga lógarheimild at fáa hendur á øllum skjølum fyri at útinna hetta eftirlit.*

*Stk. 2. Um so er, at landsgrannskoðarin ella ríkisgrannskoðarin vísa á, at peningur sbr. stk. 1 ikki er nýttur til almannagagnlig endamál, hevur landsstýrismaðurin heimild til við kunngerð at áseta, at tann peningur, sum eftir § 9 skal býtast av Ítróttasambandi Føroya og Føroya Ungdómsráð, í staðin verður útbýttur av landsstýrismanninum."*

Í Danmark hevur t.d. Undervisningsministeriet í kunngerðum sett reglur um rokn-skap og grannskoðan av stuðli m.a. til "Dansk Ungdoms Fællesråd", og eisini sett reglur um roknskap og grannskoðan av teimum ungdómsfeløgum, sum fáa stuðul frá "Dansk Ungdoms Fællesråd".

Í Grønlandi hevur heimastýrið í "Landstingslov om fordeling af tips- og lotto-midler" m.a. ásett, at studningurin skal verða rindaður aftur, hevur umsøkjarin givið skeivar upplýsingar.

Fólkatingslógin heimilar landsstýrunum at áseta reglur um viðgerð og góðkenning av umsóknum, um treytir fyri studningi, um at útvega upplýsingar og at áseta reglur um roknskap og grannskoðan.

## 2.3 Samskifti við landsstýrismannin í innlendismálum

Í Føroyum hevur Løgtingið ongar tílíkar reglur sett í Ll. nr. 34/1999 "um ítrótta-vedding v.m.", og heldur ikki er heimilað/álagt landsstýrismanninum at áseta tílíkar reglur. Vanliga áliggur tað landsstýrismanninum í rímiligan mun at føra eftirlit og seta reglur. Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at mótvegis Løgtinginum hevur lands-stýrismaðurin ábyrgdina av, at játtanir á fíggjarlógini, eisini tær sum meginfeløg o.o. umsita, verða umsitnar rætt, og at umsitingin fer fram á lógligan hátt.

Innlendismálaráðið helt í oktober 2004, at slíkar reglur áttu at verið gjørdar fyri Føroyar, men vísti á, at orkan í føroysku fyrisitingini er avmarkað. Innlendismálaráðið kunnaði samstundis um, at vegna stóra skerjing í Innlendismálaráðnum vóru

veddingamál ikki raðfest í 2005, og tí fór í fyrsta lagi at verða vent aftur til hetta mál í 2006.

Í februar 2006 boðaði Innlendismálaráðið frá, at ráðið var ikki ósamt við Landsgrannskoðanini í, at slíkar reglur eiga at verða gjørdar í Føroyum. Hinvegin er arbeiðsorkan í føroysku fyrisitingini sera avmarkað í mun til t.d. donsku fyrisitingina, og má tað tí ásannast, at tað ikki ber til at gera eins nógvar reglur í Føroyum, sum í Danmark, í øllum førum ikki líka skjótt. Landsstýrismaðurin hevur ongar ítøkiligar ætlanir um at gera slíkar reglur. Hildið verður, tá hugsað verður um samlaðu arbeiðsorkuna, at skulu slíkar reglur verða gjørdar í Føroyum, eiga tær at verða gjørdar antin av einum ávísum aðalráði/myndugleika, ella í felag av teimum aðalráðum, sum hava tørv á slíkum reglum.

Í september 2006 boðaði Innlendismálaráðið frá, at einki nýtt var hent í málinum.

Í skrivi 13. oktober 2006 til Rættarnevndina kunnaði landsstýrismaðurin um, at *"Landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur ongar leiðreglur gjørt og hevur, sum er, ikki tikið avgerð um, í hvønn mun Innlendismálaráðið eigur at raðfesta hesa uppgávu."*

Í ummælisskrivi sínum 18. oktober 2006 til Fíggjarnevndina er Rættarnevndin av teirri fatan, at eingin peningur eigur at verða goldin út, fyrr enn leiðreglurnar eru gjørdar.

Lóg um ítróttavedding kom í gildi í apríl 1999 og hevur sostatt virkað í 8 ár. Eftir okkara tykki er tað ikki nøktandi, at føroyska heimastýrið ikki enn hevur ásett *"nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision"*, og at ongar ætlanir eru um at áseta tílíkar reglur.

# 3 Ítróttasamband Føroya

## 3.1 Veddingarpengar

Í roknskapinum hjá ÍSF fyri 2006 eru inntøkuførdar 4.920 t.kr., sum er parturin av veddingarpengunum fyri 2006, sum ÍSF skal umsita. Av stuðlinum fær ÍSF sjálvt 615 t.kr. til felags-rakstur, og ÍSF rindar 4.305 t.kr. víðari sum stuðul til sersambond.

***1) Í juli 2007 heitti Landsgrannskoðanin á landsstýrismannin at útvega Landsgrannskoðanini upplýsingar um, hvørji krøv verða sett til, hvat veddingarpengarnir kunnu verða brúktir til, og hvørji krøv eru til roknskaparførslu, grannskoðan o.t.***

***2) Vit spurdu eisini, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið.***

***Hesir spurningar eru ikki svaraðir, og hava vit tí sett teir av nýggjum.***

Sambært einari notu í roknskapinum 2006 hjá ÍSF eru veddingarpeningarnir býttir soleiðis:

kr.

| | |
|---|---:|
| Fótbóltssambandið | 738.000 |
| Hondbóltssambandið*) | 492.000 |
| Flogbóltssambandið*) | 492.000 |
| Svimjisambandið*) | 369.000 |
| Róðrarsambandið*) | 246.000 |
| Fimleikasambandið*) | 246.000 |
| Badmintonsambandið*) | 246.000 |
| Borðtennissambandið*) | 184.500 |
| Judosambandið*) | 184.500 |
| Ítróttasambandið fyri Brekað | 184.500 |
| Skjótisambandið*) | 184.500 |
| Frælsur Ítróttur Føroya*) | 184.500 |
| Sambandið fyri Súkkling og Triathlon*) | 184.500 |
| Deildarsambandið fyri Nýstovnaðan Ítrótt*) | 184.500 |
| Ríðisambandið*) | 184.500 |
| **Tilsamans** | **4.305.000** |

Vit spurdu í juli 2007, eftir hvørjum meginreglum stuðulin verður býttur millum sersambondini.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at stuðulin verður býttur millum sersambondini á stjórnarfundi í ÍSF. Starvsfundurin fyrireikar málið og leggur tað fyri fundin. Á fundinum verða onkrar tilrættingar gjørdar, alt eftir, hvat serligt virksemi ávís sersambond hava, men annars verður stuðulin býttur eftir sama býtislykli, sum semja hevur verið um í nógv ár.

***3) Í juli 2007 heittu vit á landsstýrismannin um at útvega Landsgrannskoðanini ársroknskap og grannskoðanarprotokoll/-frágreiðing fyri 2006 frá 13 sersambondum merkt við *).***

***Vit hava ikki fingið hetta tilfar, og vit hava tí enn eina ferð heitt á landsstýrismannin um at útvega Landsgrannskoðanini umbidna tilfarið.***

## 3.2 Játtan á fíggjarlógini til ÍSF

Ein serstøk játtan á fíggjarlógini, 6,4 mió.kr., ber heitið "Ítróttasamband Føroya":

1. 2 mió.kr. er stuðul til ÍSF.
2. 3,3 mió.kr. fer til ferðastuðul innanoyggja hjá ítróttafólki.
3. 900 t.kr. fer til Fótbóltssamband Føroya. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2006 stendur, at av játtanini "eru 300 t.kr. settar av til bóltvenjarastuðul og 200 t.kr. sum stuðul til altjóða arbeiðið hjá Fótbóltssambandinum".
4. 200 t.kr. fer til ein ítróttaráðgeva til ÍSB.

Ad 3: Í juli 2007 spurdu vit, hvussu Mentamálaráðið tryggjar sær, at peningurin er brúktur til ásetta endamálið.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at sambært roknskapinum hjá Fótbóltssambandinum eru 878 t.kr. nýttar til ymisk bóltvenjandi tiltøk. Í roknskapinum er ikki greinað, hvørjir partar av arbeiðinum hjá Fótbóltssambandinum er "altjóða arbeiðið", men tá stórur partar av virkseminum hjá FSF er altjóða arbeiði, átti tað ikki at verið ein trupulleiki.

Sambært einari notu í roknskapinum 2006 hjá ÍSF er landskassastuðulin býttur soleiðis:

| | kr. |
|---|---:|
| Fótbóltssambandið | 1.065.714 |
| Hondbóltssambandið | 220.143 |
| Flogbóltssambandið | 220.143 |
| Svimjisambandið | 165.857 |
| Róðrarsambandið | 119.571 |
| Fimleikasambandið | 119.571 |
| Badmintonsambandið | 119.571 |
| Borðtennissambandið | 112.429 |
| Judosambandið | 112.429 |
| Ítróttarsambandið fyri Brekað | 112.429 |
| Skjótisambandið | 66.429 |
| Frælsur Ítróttur Føroya | 61.429 |
| Sambandið fyri Súkkling og Triathlon | 61.429 |
| Deildarsambandið fyri Nýstovnaðan Ítrótt | 66.429 |
| Ríðisambandið | 66.429 |
| Bowling | 20.000 |
| **Tilsamans** | **2.710.002** |

Vit spurdu í juli 2007, eftir hvørjum meginreglum stuðulin verður býttur millum sersambondini.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at stuðlin verður býttur millum sersambondini á stjórnarfundi í ÍSF. Starvsfundurin fyrireikar málið og leggur tað fyri fundin. Á fundinum verða onkrar tilrættingar gjørdar, alt eftir, hvat serligt virksemi ávís sersambond hava, men annars verður stuðulin býttur eftir sama býtislykli, ið semja hevur verið um í nógv ár.

Sambært roknskapinum hjá ÍSF fekk ÍSF harafturat 272 t.kr. í stuðli frá Nordisk Ministerråd, og rindaði av hesari upphædd 263 t.kr. til sersambondini. ÍSF fekk eisini 115 t.kr. í stuðli fra Happadráttargrunninum.

Sambært Búskaparskipan Landsins hevur ÍSF harumframt fingið 330 t.kr. av veddingarpengunum frá Mentamáláráðnum, umvegis "Tiltøk fyri børn og ung", til ein ítrótta- og ungdómsráðgeva. Landsgrannskoðanin dugir ikki at síggja, at upphæddin gongur fram av roknskapinum hjá ÍSF.

Sambært landsstýrismanninum í oktober 2007 hevur ÍSF kunnað um, at upphæddin er ikki bókað í roknskapinum hjá ÍSF fyri 2006, tí peningurin varð ikki fluttur ÍSF fyrr enn í 2007. Upphæddin vil tí innganga í roknskapin fyri 2007.

## 3.3 Fótbóltssamband Føroya

Stuðul á fíggjarlógini

Sum nevnt, hevur Fótbóltssambandinum fingið játtað 900 t.kr. á fíggjarlógini umvegis játtanina "Ítróttasamband Føroya". Harumframt fekk Fótbóltssambandið 80 t.kr. frá ÍSF av játtanini á fíggjarlógini til ÍSF, tilsamans 980 t.kr.

Sambært roknskapinum hjá Fótbóltssambandinum fekk Fótbóltssambandið í 2006 980 t.kr. í landskassastuðli, men sambært roknskapinum hjá ÍSF fekk Fótbóltssambandnum 1.066 t.kr. í landskassastuðli umvegis ÍSF, ein munur 86 t.kr.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í apríl 2007 fingu øll sersambondini játtað eykapening, og Fótbóltssambandið fekk 86 t.kr., sum er munurin frammanfyri.

Stuðul av veddingarpengunum umvegis ÍSF

Sambært roknskapinum hjá Fótbóltssambandinum fekk Fótbóltssambandið í 2006 820 t.kr. av veddingarpengunum umvegis ÍSF, men sambært roknskapinum hjá ÍSF fekk Fótbóltssambandið 738 t.kr.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at FSF metti upphæddina til 820 t.kr. Tá roknskapurin hjá FSF verður settur upp í januar mánað, eru endaligu upphæddirnar ikki tøkar, hvørjar inntøkurnar hjá FSF verða. Reguleringar koma síðani seinni.

Stuðul til sparkivallir

Fótbóltssambandið hevur av játtanini "Ítróttaanlegg" fingið 350 t.kr. til sparkivallir. Landsgrannskoðanin dugir ikki at síggja, at upphæddin gongur fram av roknskapinum hjá Fótbóltssambandinum.

Í oktober 2007 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at stuðulin til sparkivallir verður ikki tikin inn í roknskapinum hjá FSF umvegis raksturin, men munurin millum inntøkurnar og útreiðslurnar av verkætlanini verður avsettur í fíggjarstøðuni, sum skuld/avseting undir "sparkivallarverkætlan". Á hendan hátt umsitur FSF verkætlanina, uttan at tað ávirkar raksturin ella úrslitið hjá FSF. FSF hevur eisini serstaka peningastovnskontu til verkætlanina. Mentamálaráðið hevur staðfest, at tær 350 t.kr. eru bókaðar undir fíggjarstøðuni/avsetingini.

## 3.4 ÍSB

Inntøkurnar hjá ÍSB eru sambært ársroknskapinum 2006 1.398 t.kr., sum kunnu verða greinaðar soleiðis:

Almennur stuðul:

- 200 t.kr. av játtanini á fíggjarlógini til ÍSB. Játtanin ber heitið "ÍSB". Í viðmerkingunum til fíggjarlógina stendur, at játtanin er stuðul til ein ítróttaráðgeva. Sambært ársroknskapinum 2006 hjá ÍSB sæst, at lønarútreiðslurnar til ítróttaráðgeva í 2006 eru 238 t.kr.
- 125 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis ÍSF. Sambært roknskapinum hjá ÍSF fekk ÍSB 185 t.kr. av veddingarpengunum. Sambært skjølum hjá ÍSF eru

fluttar 185 t.kr. 22. mai 2006. ***4) Vit hava spurt, hvar munurin 60 t.kr. er bókaður***.

- 112 t.kr. í landskassastuðli, umvegis ÍSF.
- 21 t.kr. frá Nordisk Ministerråd, umvegis ÍSF.
- 18 t.kr. frá Jólamerkjagrunninum.
- 8 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis "Tiltøk fyri børn og ung".
- 3 t.kr. av øðrum játtanum á fíggjarlógini.

Aðrar inntøkur

- 452 t.kr. í lima- og luttøkugjøldum,
- 100 t.kr. frá P/f Føroya Lívstrygging,
- 100 t.kr. frá P/f Skemmuni,
- 91 t.kr. aðrar inntøkur, lutaseðlar o.a.,
- 76 t.kr. frá stuðulsfelag ÍSB og MBF,
- 63 t.kr. frá P/f Føroya Tele,
- 50 t.kr. frá Tórshavnar Býráð.

Útreiðslurnar hjá ÍSB í 2006 eru 1.432 t.kr., sum kunnu verða greinaðar soleiðis:

- 839 t.kr. venjingarlegur o.a.,
- 412 t.kr. lønir, samsýningar og arbeiðsmarknaðargjøld.
- 181 t.kr. hallar- og hølisleiga, skrivstovuhald, umsiting, grannskoðan, gávur o.a.

# 4 Føroya Ungdómsráð (FUR)

Sambært reglugerðini hjá FUR "um býti av stuðli frá Sp/f Ítróttavedding til FUR og lima-felagsskapirnar" tekur FUR sær av allari umsitingini. Í reglugerðini, sum er frá 2005, er m.a. ásett: *"Stuðul verður latin eina ferð árliga. Umsóknir skulu verða FUR í hendi í seinasta lagi 1. apríl. Saman við umsóknini skulu umsøkjarar lata inn ársfrágreiðing, grannskoðaðan roknskap, limalista pr. 31.12. í undanfarna ári yvir allar limir undir 30 ár, virkisætlan og/ella -skrá og fíggjarætlan fyri verandi ár. Í staðin fyri limalista kunnu felagsskapir lata inn váttan frá skrásettum grannskoðara um limatal."*

## 4.1 Stuðulstreytir

Sambært reglugerðini skal talan vera um landsfelagsskap, sum er limur í FUR, ella lokalfelag, sum hevur limaskap í einum av limafelagsskapum FUR's.

Limafelagsskapir, sum søkja, skulu lúka hesar treytir:

- Hava heimstað í Føroyum.
- Hava í minsta lagi 50 gjaldandi limir undir 30 ár í trimum valdømum 31.12. undanfarna ár.
- Limagjaldið í lokalfeløgunum skal vera í minsta lagi 100 kr. árliga fyri hvønn lim.
- Rokningar fyri limagjald skulu vera sendar limunum í undanfarna ári.
- Hava fólkaræðisligar viðtøkur, har tey ungu hava ávirkan á leiðsluna.
- Hava egna nevnd og egið virksemi.
- Hava sent umsókn rættstundis, smb. § 4 í hesari reglugerð.

Lokalfeløg, sum søkja, skulu lúka hesar treytir:

- Hava heimstað í Føroyum.
- Hava í minsta lagi 10 gjaldandi limir undir 30 ár 31.12. undanfarna ár (lokalfeløg). Eru fleiri enn eitt lokalfelag í sama býi/bygd, skulu tey eftir-fylgjandi lokalfeløgini hava í minsta lagi 25 gjaldandi limir hvørt.
- Limagjaldið skal vera í minsta lagi 100 kr. árliga fyri hvønn lim.
- Rokningar fyri limagjald skulu vera sendar limunum í undanfarna ári.
- Hava fólkaræðisligar viðtøkur, har tey ungu hava ávirkan á leiðsluna.
- Hava egna nevnd og egið virksemi.
- Lokalfeløg skulu hava verið limir í landsfelag í minsta lagi eitt ár, áðrenn tey kunnu søkja um stuðul – tó undantikið úr Stuðulsgrunni FUR's.
- Lokalfeløg kunna – í stuðulshøpi – bara verða limir í einum landsfelag.
- Hava sent umsókn rættstundis, smb. § 4 í hesi reglugerð.

Næmingafeløg verða ikki roknað sum lokalfeløg, men tey kunnu søkja stuðul á kr. 2.000,- hvørt ár. Stuðul kann ikki verða veittur til ítróttalig endamál.

Saman við umsóknini skulu umsøkjarar lata inn ársfrágreiðing, grannskoðaðan roknskap, limalista 31.12. undanfarna ár yvir allar limir yngri enn 30 ár, virkisætlan og/ella -skrá og fíggjarætlan fyri verandi ár. Í staðin fyri limalista kunnu felagsskapir lata inn váttan frá skrásettum grannskoðara um limatal.

***5) Í juli 2007 heitti Landsgrannskoðanin á landsstýrismanninum at útvega Landsgrannskoðanini upplýsingar um, hvørji krøv verða sett til, hvat veddingar-pengarnir kunnu verða nýttir til, og hvørji krøv eru til roknskaparførslu, grann-skoðan o.t.***

***6) Vit spurdu eisini, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið.***

***Hesir spurningar eru ikki svaraðir, og hava vit tí sett teir av nýggjum.***

## 4.2 Býtið av stuðlinum

Sambært reglugerðini verður stuðulin býttur soleiðis:

FUR:

Umsiting av FUR: 400 t.kr.

Stuðulsgrunnur FUR's 10%

Landsfelagsskapir:

Grundstuðul 15%

Stuðul til lokalfeløg 10%

Limastuðul 25%

Lokalfeløg:

Grundstuðul 15%

Limastuðul 25%

Sambært roknskapinum hjá FUR vórðu veddingarpengarnir býttir soleiðis í 2005 og 2006:

t.kr.

| | 2005 | | | 2006 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Veddingarpengar | | | *2.040* | | | *1.640* |
| Býtt út til feløg o.o.: | | | | | | |
| – Førova Ungdómsráð | | 400 | | | 400 | |
| – Landsfelagsskapir | 809 | | | 618 | | |
| – Lokalfeløg | 651 | 1.460 | | 495 | 1.113 | |
| – Stuðulsgrunnar | | 45 | | | 69 | |
| *Býtt út tilsamans* | | | *1.905* | | | *1.582* |
| Avlop | | | 135 | | | 58 |

Sambært roknskapinum er avlopið sett á bankabók. Tilsamans stóðu 332 t.kr. á bók 31. desember 2006.

Sum víst á frammanfyri:

1. Fekk FUR sjálvt 400 t.kr. av veddingarpengunum í 2006.
2. Umframt veddingarpengarnar fekk FUR í 2006 150 t.kr. av undirkontu 7.24.1.13.03. "Ungmannafeløg og skótarørsla".
3. Aðrar inntøkur hjá FUR vóru í 2006 257 t.kr.

Samlaðu útreiðslurnar í 2006 vóru 788 t.kr., av hesum lønarútreiðslur 372 t.kr. og umsitingarútreiðslur um 416 t.kr.:

kr.

| | |
|---|---:|
| Húsaleiga | 50.400 |
| Ferðaútreiðslur og umboðan | 76.546 |
| Skrivstovuútreiðslur, edv, granskoðan o.a. | 52.564 |
| Samskiftisútreiðslur | 25.091 |
| Vest Nordisk Ungdomsforum | 127.312 |
| Ungdómsráðstevnan | 46.664 |
| Fundir | 24.920 |
| Aðrar útreiðslur | 12.864 |
| **Tilsamans** | **416.361** |

## 4.3 Landsfelagsskapir og lokalfeløg

Av veddingarpengunum, ið FUR býtti út, eru í 2005 tilsamans goldnar 1.460 t.kr. til landsfelagsskapir og lokalfeløg; í 2006 tilsamans 1.113 t.kr. Í notu í roknskapinum er greinað, hvør hevur fingið peningin, og niðanfyri hava vit bólkað stuðulsmót-takararnar:

kr.

| | 2005 | 2006 |
|---|---:|---:|
| Skótafeløg, KFUM og KFUK***)* | 858.323 | 626.420 |
| Blákrossungdómur***)* | 104.879 | 84.335 |
| Unga Tjóðveldið***)* | 88.407 | 82.905 |
| CISV – Altjóða Barnalegur | 63.174 | 45.925 |
| Sosialistiskt Ungmannafelag***)* | 51.175 | - |
| Fólkafloksungdómur***)* | 34.456 | 24.865 |
| Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum | 46.912 | 35.800 |
| Tónaungdómur***)* | 46.912 | - |
| Landsfelag Føroyinga í Útbúgving | 45.009 | 35.125 |
| Dramaverkstaðið***)* | - | 32.830 |
| FH Ungdómar***)* | 18.200 | 48.360 |
| Onnur | 102.650 | 96.300 |
| **Tilsamans** | **1.460.097** | **1.112.865** |

Landsgrannskoðanin hevur fingið nakrar av roknskapunum frá feløgum. ***7) Í juli 2007 heitti Landsgrannskoðanin á landsstýrismannin um at útvega Landsgrannskoð-anini ársroknskap og grannskoðanarprotokoll/-frágreiðing fyri 2005 og 2006 frá feløgum merkt við **).***

***Vit hava ikki fingið hetta tilfar, og tí hava vit enn eina ferð heitt á landsstýris-mannin um at útvega Landsgrannskoðanini umbidna tilfarið****.*

## 4.4 Stuðul til feløg, ið fáa annan stuðul

Vit hava heft okkum við, at fleiri feløg, sum í 2006 fingu stuðul umvegis FUR av veddingarpengunum, eisini fingu stuðul frá ymiskum játtanum á løgtingsfíggjarlógini:

Skótafeløg

- 626 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis FUR,
- 200 t.kr. av játtanini 7.24.1.13.03. “Ungmannafeløg og skótarørsla”.

<u>CISV – Altjóða barnalegur</u>

- 46 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis FUR,
- 20 t.kr. av játtanini 7.24.1.13.03 “Ungmannafeløg og skótarørsla”.

<u>Blái Krossur Føroya</u>

- 85 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis FUR,
- 300 t.kr. av játtanini 8.20.1.07. “Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu”,
- 300 t.kr. til “Blái Krossur Café” av játtanini 8.21.1.22. “Stuðul til feløg”,
- 130 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis “Tiltøk fyri børn og ung”, til verkætlanina ”Børn í vanda”.

<u>Landsfelag Føroyinga í Útbúgving</u>

- 35 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis FUR,
- 250 t.kr. av játtanini 7.24.1.13.03. ”Ymiskir studningar”.

<u>Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum</u>

- 36 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis FUR,
- 1.400 t.kr. av játtanini 8.21.5.01. “Stuðul til feløg hjá brekaðum”,
- 199 t.kr. í stuðli frá Grunninum ætlaður brekaðum (Happadráttargrunnurin).

## 4.5 <u>Stuðulsgrunnur FUR’s</u>

Ein eyka stuðulsmøguleiki er stuðul úr Stuðulsgrunninum hjá FUR. Sambært reglugerðini kann stuðul verða latin limafelagsskapum og lokalfeløgum til serliga góðar verkætlanir fyri børn og ung, ella til samfelagsgagnligar verkætlanir, har børn og ung eru virkin. Stuðul verður bert latin eina ferð fyri sama tiltak. Stuðul verður býttur so ofta, sum starvsstjórnin heldur tað hóska.

Sambært einari notu í roknskapinum hjá FUR er stuðul í 2005 latin:

- 50 t.kr. Barnabati
- 30 t.kr. KFUM, fløguútgáva
- 25 t.kr. BKU, filmur
- 20 t.kr. KFUM, Sound of Glory Tensing
- 15 t.kr. Ung í MáF
- 3 t.kr. KFUK

Í 2006 er stuðul latin:

- 50 t.kr. Barnabati
- 10 t.kr. Ung í MáF, sjónleikarastevna
- 9 t.kr. Unga Tjóðveldið

# 5 Mentamálaráðið (Tiltøk fyri børn og ung)

Á høvuðskontu 7.24.1.05. “Tiltøk fyri børn og ung” er í 2006 ein inntøku- og ein útreiðslujáttan, sum eru eins stórar, 900 t.kr. Talan er um ætlaðar inntøkur av føroyska partinum av yvirskotinum frá A/S Danske Spil, sum verða tillutaðar Mentamálaráðnum, umvegis Sp/f Ítróttavedding. Sambært landsroknskapinum vóru í 2006 veddingarpengarnir til Mentamálaráðið 1.640 t.kr.

## 5.1 Endamál

Peningurin verður eftir umsókn játtaður til verkætlanir og tiltøk fyri børn og ung. Játtanin verður umsitin sambært “Vegleiðing til umsókn til stuðul av veddingarpengunum til barna- og ungdómsarbeiði”. Í vegleiðingini er neyvari ásett um endamál og um tiltøk, ið kunnu fáa stuðul, um umsóknarbløð, umsóknarfreistir, treytir o.a.m. Sambært vegleiðingini er endamálið við tiltakinum ella verkætlanini:

*”at stuðla verkætlanum og tiltøkum til gagns fyri børn og ung. Dømi um verkætlanir og tiltøk, sum kunnu fáa stuðul eftir hesi játtan, eru:*

*a) listarligt virksemi,*

*b) søgulig og siðsøgulig tiltøk, umframt tiltøk, ið sum heild økja um kunnleikan hjá børnum og ungum til land og fólk, nærumhvørvið og lokalsamfelagið sum heild,*

*c) virksemi, ið stimbrar og mennir listarlig, skapandi, mennandi og útinnandi evni hjá børnum og ungum, eisini innan KT-økið,*

*d) ráðstevnur, skeið og seminar,*

*e) samstarv millum skúlar og ungdómsfelagsskapir o.l.,*

*f) íverksetarastuðul til stovnan av ungdómsfeløgum við almentgagnligum endamáli o.a.,*

*g) ferðir innan- og uttanlands, eisini námsferðir, tá ið innihaldið samsvarar endamálinum, og samstarv er við minst eitt annað land undir námsferðini,*

*h) verkætlanir, ið kunna haldast at menna førleikar hjá børnum og ungum at liva og virka í einum fólkaræðisligum samfelag, og stimbra teirra tolsemi og virðing fyri medmenniskjum uttan mun til húðarlit, politiska ella átrúnaðarliga áskoðan,*

*i) verkætlanir, ið hava til endamáls at læra børn og ung at virða mannarættindi úti sum heima,*

*j) alment viðurkendar ítróttir við mennandi innihaldi, sum frammanundan ikki fáa stuðul á fíggjarløgtingslógini,*

*k) upplýsandi tiltøk fyri børn og ung um gagnliga týdningin av norðurlendskum og øðrum altjóða samstarvi, um mannarættindi, burðardygga menning o.a.,*

*l) upplýsandi og fyribyrgjandi tiltøk fyri børn og ung t.d. um:*

- *ferðslutrygd og ferðslumentan*
- *rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu*
- *umhvørvi og náttúrudálking o.a.*
- *harðskap og herverk*
- *fremmandahatur, rasismu og kríggj o.a.*
- *annað av týdningi fyri medferðina og vælferðina hjá børnum og ungum*

*m) útvegan av tólum og útgerð, sum hava týdning í menningini av børnum og ungum, og*

*n) annað, ið kann metast hava týdning fyri endamálið.*

*“Børn og ung” fevnir um børn og ung til og við 25 ár. Fyri at fáa stuðul av hesi játtan, skulu minst 75% av luttakarunum í verkætlanini ella tiltakinum vera børn og ung, ella tilætlað hesum aldursbólki.”*

Eftir hesum at døma er ilt at fáa eyga á verkætlanir ella tiltøk, ið ikki kunnu fáa stuðul.

## 5.2 Stuðulstreytir

Sambært játtanarskrivinum eigur frágreiðing við grannskoðaðum roknskapi at verða latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at verkætlanin ella tiltakið er lokið.

Í juli 2007 spurdi Landsgrannskoðanin, hvørji krøv eru til roknskaparførslu, grannskoðan o.t., og hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ávísar treytir verða settar í játtanarskrivinum. Tá ið stuðulstiltakið hevur verið, fær Mentamálaráðið frágreiðing og roknskap um nýtsluna. Uttan tó, at tað beinleiðis er skjalfest, verða krøvini til roknskap og grannskoðan herd, alt eftir, hvussu stór stuðulstilsøgnin er. Hugt verður eisini eftir, um aðrir stuðulsveitarar taka lut í fíggingini av tiltakinum. Sum meginregla kann sigast, at grannskoðarakravið verður sett, um stuðulin er hægri enn 20 til 40 t.kr. Hugt verður eisini eftir, hvussu tiltakið er lýst við roknskapi og frágreiðing.

**Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini**

Sum víst á, er endamálið við stuðlinum sera breitt orðað, og ikki er ásett, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið. Gjøllari krøv til roknskaparførslu og grannskoðan eru ikki ásett.

Landsgrannskoðanin hevur í áravís víst á, at gjøllari reglur um roknskap og grannskoðan áttu at verið ásettar, vísandi til ásetingarnar í § 7 B í lógarkunngerð nr. 464/2006 "Lovbekendtgørelse af lov om visse spil, lotterier og væddemål".

## 5.3 Stuðul til feløg, ið fáa annan stuðul

Vit hava kannað útgjaldingar í 2006 og hava heft okkum við, at stuðul verður latin feløgum/felagsskapum, ið eisini hava fingið stuðul av veddingarpengunum, umvegis Føroya Ungdómsráð (FUR), ella eru á fíggjarlógini við stuðuls- ella rakstrarjáttan.

Altjóða Skrivstovan

- 714 t.kr. av játtanini 7.24.104. "Stuðulstovnurin",
- 9 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis "Tiltøk fyri børn og ung", til stuðul í sambandi við "Nordplus Junior Kontaktseminar".

Norðurlandahúsið

- 998 t.kr. av játtanini 7.24.2.10. "Norðurlandahúsið",
- 275 t.kr. av veddingarpengunum umvegis "Tiltøk fyri børn og ung" til verkætlanina "Ung i Norden" (225 t.kr. í 2005),
- 50 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis "Tiltøk fyri børn og ung", til verkætlanina "Ung í Føroyum".

Talvsamband Føroya

- 225 t.kr. av játtanini 7.24.6.08. "Hugasamband Føroya",

- 80 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis “Tiltøk fyri børn og ung”, til barna- og ungdómsarbeiði.

Menningarstovan

- 4 mió.kr. av játtanini 6.37.1.01. “Menningarstovan”,
- 50 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis “Tiltøk fyri børn og ung”, til stuðul til “Norðurlendskan Summar-Filmsskúla í Føroyum”,
- 1,7 mió.kr. frá Vinnuframagrunninum til stuðul til m.a. sølumessu/konsert í Reykavík, til handilsferðir og til Northern Periphery verkætlan.

Tjóðpallur Føroya

- 2,5 mió.kr. av játtanini 7.24.2.06. “Leiklist”,
- 105 t.kr. av játtanini 7.24.2.16. “Sjónleikarhús”,
- 100 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis “Tiltøk fyri børn og ung”, til stuðul til skúlaverkætlanina í sambandi við operu.

Meginfelag áhugaleikara Føroya

- 750 t.kr. av játtanini 7.24.2.06. “Leiklist”,
- 150 t.kr. til “NEATA-sjónleikarastevnuna” av veddingarpengunum, umvegis “Tiltøk fyri børn og ung”,
- 25 t.kr. til “NEATA-sjónleikarastevnuna” í stuðli frá Mentanargrunninum.

Havnar Sjónleikarafelag

- 50 t.kr. í stuðli frá Mentanargrunninum,
- 10 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis “Tiltøk fyri børn og ung”, til verkætlanina “Eitt jólaævintýr”.

Vit hava eisini heft okkum við, at studningur verður veittur til somu endamál frá øðrum stuðulsjáttanum, ið Mentamálastýrið umsitur, ella frá øðrum stuðulsjáttanum:

Tónleikabólkurin ”Aldubáran”

- 150 t.kr. av játtanini 7.24.13.04. ”Stuðul til onnur endamál”,
- 50 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis “Tiltøk fyri børn og ung”,
- 30 t.kr. í stuðli frá Mentanargrunninum.

Felagið Barnabati

- 100 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis “Tiltøk fyri børn og ung”, til verkætlanina “Tú hevur rætt”,
- 50 t.kr. av játtanini 8.21.3.16. “Felagið Barnabati”,
- 50 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis FUR,
- 40 t.kr. í stuðli av játtanini 8.21.1.25. “Studningur annars”.

## 5.4 Skattskyldug/ikki skattskyldug inntøka

Mentamálaráðið rindar stuðul til eftirútbúgving, førleikamenning, konsertferð, skeið, tónleikalesnað o.a. inn á bankakontu hjá umsøkjara, uttan um skattaskipanina. Lands-

grannskoðanin hevur víst á, at henda mannagongd tykist ikki vera samsvarandi ásetingunum í § 60 í skattalógini um A-inntøku.

Mentamálaráðið hevur í september 2007 greitt frá:

*at* fram til 2005 tók Mentamálaráðið avrit av øllum útgjaldsskjølum og sendi tey Toll- og Skattstovu Føroya eina ferð um árið.

*at* á fundi millum Mentamálaráðið og umboð fyri Toll- og Skattstovu Føroya í oktober 2004 varð avtalað at fara yvir til eina meira arbeiðssparandi mannagongd, nú øll útgjaldsskjøl verða ljóslisin og harvið teldutøk.

*at* frá 2005 fær Toll- og Skattstovu Føroya frá Mentamálaráðnum upplýsingar um, hvørji stovnsnummur Mentamálaráðið letur stuðul til, og Toll- og Skattstovu Føroya fær heimild at lesa øll bókingarskjøl á hesum stovnsnumrum.

Landsgrannskoðanin ivast í, um avtalan/mannagongdin hevur nakra lógarheimild, í teimum førum talan er um studning, ið er at rokna sum A-inntøku smb. § 60, stk. 1, nr. 6, í skattalógini. Hetta tí, at smb. § 63 skal, áðrenn A-inntøka verður goldin skattgjaldara, A-skattur verða avroknaður í upphæddini. Arbeiðsgevarin skal gjalda A-inntøkuna til eitt av Landsstýrinum góðkent avrokningarstað.

Vit hava eisini áður reist sama spurning í sambandi við studning úr Mentanargrunninum.

Landsgrannskoðanin hevur í oktober 2007 umrøtt málið við leiðsluna á Toll- og Skattstovu Føroya, sum eisini sigur seg ivast í, um mannagongdin er røtt.

***8) Landsgrannskoðanin hevur tí mælt til, at spurningurin verður viðgjørdur av nýggjum***. (Víst verður eisini til spurning 13 viðvíkjandi samsýningum hjá Føroya Symfoniorkestri).

# 6 Ymiskir studningar 7.24.1.13.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina verða játtanirnar umsitnar við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 “um stuðul til mentan og list v.m.”.

Í § 2, stk. 3, í lógini stendur, at *“Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð neyvari treytir og reglur fyri, nær og hvussu stuðul verður játtaður, herundir krav um fíggjarætlan, eftirlit, upplýsingaskyldu, roknskap og grannskoðan hjá stuðulsmóttakarum og um møguliga afturrindan av stuðli.”* Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett neyvari treytir og reglur í kunngerð.

Í februar 2006 boðaði Mentamálaráðið frá, at uppskot til kunngerð er gjørt, og kunngerðin verður væntandi lýst heilt skjótt.

Í juni 2006 boðaði landsstýrismaðurin frá, at kunngerðin var liðug at fara til umrøðu á landsstýrisfundi og síðani til løgfrøðiliga eftirkanning.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at kunngerðin hevur einaferð verið fyri á landsstýrisfundi, men skuldi verða broytt. Tað er nú gjørt, og kunngerðin fer í næstum aftur fyri á landsstýrisfund.

## 6.1 Undirkonta 01. Før. - ísl. - grønl. mentanarsamstarv

Játtanin 449 t.kr. er til at fremja mentanarsamstarv í útnorðri. Samstarvsavtala er gjørd fyri tíðarskeiðið 2004 – 2006.

Vit hava heft okkum við, at:

- Norðurbryggjan hevur fingið 200 t.kr. í “mentanarstuðli” av hesari kontu.
- Norðurbryggjan fær frammanundan 300 t.kr. í stuðli av játtanini 2.13.1.04. “Norðurbryggjan í Keypmannahavn”.
- Harumframt rindar Sendistovan í Keypmannahavn Norðurbryggjuni 2 mió.kr. um árið í húsaleigu av játtanini 2.13.1.01. “Sendistovur”.
- Eisini hevur Ferðaráð Føroya rindað 150 t.kr. til Nordatlantisk Turistselskab Aps, hvørs endamál er at reka eina kunningartænastu á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn.

Vit hava eisini heft okkum við, at Mentamálaráðið av hesari kontu hevur rindað tvær rokningar á 25.000 kr. frá Sendistovuni í Keypmannahavn fyri “Haldaragjald, Norðurbryggjan”.

Sambært landsstýrismanninum brúkar Mentamálaráðið hølini á Norðurbryggjuni til norðurlendskt fundarvirksemi, og tí verður leigan rindað av hesari játtan.

## 6.2 Undirkonta 02. Norrøna felagið

Játtanin 150 t.kr. er til Norrøna felagið, sum varð stovnað í 1951. Í § 1 í lógum felagsins stendur: Norrøna felagið í Føroyum er landsfelag og hevur til endamáls at styðja og økja um norðurlendskt samstarv í felag við norrønu feløgini í hinum Norðurlondunum. Lógir felagsins vórðu seinast endurskoðaðar á aðalfundi 4. mars 1987. Norrøna felagið umboðar Føroyar í samstarvinum Foreningen Nordens Forbund (FNF) og umsitur eisini Nordjobb.

## 6.3 Undirkonta 03. Ungmannafeløg og skótarørsla

Játtanin 620 t.kr. er til at stuðla ungdómsarbeiði, til tess at menna ungdómin í øllum lutum. Peningurin fer til:

- 250 t.kr. Landsfelag Føroyinga í Útbúgving (LFÚ),

- 200 t.kr. Føroya Skótaráð,
- 150 t.kr. Føroya Ungdómsráð (FUR),
- 20 t.kr. CISV barnalegur.

Sum nevnt frammanfyri, undir “Føroya Ungdómsráð”, fáa hesi feløg eisini stuðul frá veddingarpengunum, umvegis Føroya Ungdómsráð (FUR).

Føroya Skótaráð

Vit hava fingið ein ikki undirskrivaðan roknskap fyri Føroya Skotaráð, ið fevnir um bæði 2005 og 2006. ***9) Vit hava spurt, um Mentamálaráðið biður um roknskap á hvørjum ári.***

Landsfelag Føroyinga í Útbúgving

Sambært roknskapinum hjá FUR fekk Landsfelag Føroyinga í Útbúgving (LFÚ) í 2005 kr. 45.009 í stuðli. Sambært einari notu í roknskapinum 2005 hjá LFÚ er stuðulin frá FUR í 2005: 9 kr. Í august 2006 kunnaði Mentamálráðið um, at sambært upplýsingunum frá nevndini í LFÚ “*eru onkrar kontur tømdar, uttan at LFÚ veit til hvønn, peningurin er farin*”.

Í juli 2007 spurdi Landsgrannskoðanin, hvørji stig Mentamáráðið hevur tikið hesum viðvíkjandi.

Í september 2007 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at Mentamálaráðið hevur kunnað Innlendismálaráðið, sum hevur “*yvirmyndugleika við gjaldinum av veddingar-pengunum (tað er hesin, ið FUR rindar víðari til teirra limafeløg).”*

***10) Vit hava spurt:***

- ***hvat síðani er hent í málinum,***
- ***hvat hugtakið ”yvirmyndugleiki” merkir, og***
- ***um landsstýrismaðurin er av tí fatan, at Innlendismálaráðið eisini hevur “yvirmyndugleikan” við veddingarpengunum, sum Mentamálaráðið og ÍSF umsita.***

## 6.4 Undirkonta 04. Stuðul til onnur endamál

### *6.4.1 Endamál*

Játtanin 1.079 t.kr. er sambært viðmerkingunum á fíggjarlógini “*ætlað til menning av mentan og list, til virknan stuðul til mentanarlív á bygd og í bý, so sum mentanarverkætlanir, mentanartiløk, konsertir, framsýningar, keyp av list og framflyting (promovering) av list innan- og uttanlands v.m.*”

### *6.4.2 Stuðulstreytir*

Sambært játtanarskrivinum eigur frágreiðing við grannskoðaðum roknskapi at verða latin Mentamálaráðnum í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at verkætlanin ella tiltakið er lokið.

### *6.4.3 Stuðul til kór*

Niðanfyri nevndu kór hava fingið stuðul til konsertferðir uttanlands:

- 50 t.kr. til Havnarkórið (umframt kr. 25.000 í stuðli frá Mentanargrunninum),

- 150 t.kr. til “Aldubáruna” (umframt 50 t.kr. av veddingarpengunum, umvegis “Tiltøk fyri børn og ung”, og 30 t.kr. í stuðli frá Mentanargrunninum),
- 11 t.kr. til Glymur (umframt 11 t.kr. í stuðli frá Mentanargrunninum),
- 40 t.kr. til Passiónskórið,
- 10 t.kr. til Kirkjukórið í Fríðrikskirkjuni (umframt 7 t.kr. í stuðli frá Mentanargrunninum),
- 10 t.kr. til Kingobólkin (umframt 10 t.kr. í stuðli frá Mentanargrunninum).

Í juli 2007 heitti Landsgrannskoðanin á landsstýrismannin um at útvega ársroknskap og grannskoðanarprotokoll/-frágreiðing fyri 2006 fyri Havnarkórið og “Aldubáruna”.

Í september 2007 boðaði landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið hevði biðið um roknskapirnar. ***11) Vit hava spurt, um Mentamálaráðið hevur fingið teir.***

### *6.4.4 Stuðul til “almennar stovnar”*

Vit hava kannað útgjaldingar í 2006 og hava heft okkum við, at stuðul verður m.a. latin nøkrum feløgum/felagsskapum, ið eru við á fíggjarlógini sum rakstrarjáttan:

Fróðskaparsetur Føroya

- 20,3 mió.kr. av játtanini 7.23.6.13. “Fróðskaparsetur Føroya” (rakstrarjáttan),
- 50 t.kr. í stuðli av játtanini “Stuðul til onnur endamál” til ráðstevnu samb. “Hetlandsavtaluni”.

Listasavn Føroya

- 1,9 mió.kr. av játtanini 7.24.3.22. “Listasøvn” (rakstrarjáttan),
- 161 t.kr. í stuðli av játtanini 7.11.1.14. “Víðlíkahald”,
- 88 t.kr. í stuðli av játtanini 7.24.3.20. “Menning av mentan og mentanararvi” til konservering av listaverkum,
- 35 t.kr. í stuðli av játtanini “Stuðul til onnur endamál” til listaframsýningar,
- 12 t.kr. í stuðli frá Mentanargrunninum.

Føroyahúsið í Keypmannahavn

- 1.683 t.kr. av játtanini 7.24.1.04. “Føroyahúsið í Keypmannahavn”,
- 15 t.kr. í stuðli av játtanini “Stuðul til onnur endamál” til ymiskar verkætlanir.

Føroya Kommunufelag

Vit hava eisini heft okkum við, at Føroya Kommunufelag fær 30 t.kr. í stuðli yvir trý ár (2004 – 2006), t.v.s. 10 t.kr. um árið til verkætlanina “Okkara lív sum eldri”.

## 6.5 Undirkonta 05. Listafólkasamband Føroya

Játtanin 300 t.kr. er ætlað til Listafólkasamband Føroya (LISA) til skrivstovuhald, ráðgeving og aðrar tænastur til føroysk listafólk.

## 6.6 Undirkonta 06. Stuðul til listafólk

Játtanin 100 t.kr. er ætlað listafólkum at nema sær útbúgvingar, ferðastuðul o.a.

# 7 Tónleikur og sangur 7.24.2.01.

## 7.1 Endamál

Játtanin 850 t.kr. er sambært viðmerkingunum á fíggjarlógini "*til at stuðla og menna tónleik og sang í Føroyum. Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m.*"

## 7.2 Stuðulsmóttakarar

Sambært Búskaparskipan Landsins er í 2006 veittur stuðul til:

| | |
|---|---|
| • Føroya Symfoniorkestur | kr. 575.000 |
| • Konsertfelagið | - 100.000 |
| • Sláið Ring | - 90.000 |
| • Kórsamband Føroya | - 65.000 |
| • Meginfelag fyri Føroysk Hornorkestur | - 20.000 |
| • Tilsamans | kr. 850.000 |

Harumframt hevur Føroya Symfoniorkestur fingið kr. 22.000 frá Mentanargrunninum.

Føroya Symfoniorkestur

Inntøkurnar hjá Føroya Symfoniorkestri eru sambært ársroknskapinum 2006 1.577 t.kr., sum eru greinaðar soleiðis:

| | |
|---|---|
| • Inntøkur | 1.120 t.kr. |
| • Inntøkur Norðlandahúsið | 457 t.kr. |

***12) Vit hava biðið um neyvari útgreining av inntøkunum 1.120 t.kr.***

Útreiðslurnar hjá Føroya Symfoniorkestri eru sambært ársroknskapinum 2006 1.481 t.kr. Av hesum eru m.a.:

| | |
|---|---|
| • samsýningar | 858 t.kr. |
| • vistarhald og matur | 262 t.kr. |
| • flogferðir | 185 t.kr. |

Sambært átekning í roknskapinum er endurgjald til ferðir, samsýningar o.a. óskattað. Henda mannagongd tykist ikki vera samsvarandi ásetingunum í § 60 í skattalógini um A-inntøku. ***13) Vit hava biðið um viðmerkingar frá landsstýrismanninum***.

# 8 Sjónleikarhús 7.24.2.16.

## 8.1 Endamál

Játtanin 125 t.kr. er sambært viðmerkingunum á fíggjarlógini "*til umbygging av sjónleikarhúsum. Eisini kann stuðul veitast til keyp av tøkniligari útgerð til sjónleikarhús. Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m.*"

## 8.2 Stuðulsmóttakarar

Sambært Búskaparskipan Landsins er í 2006 veittur stuðul til:

| | |
|---|---|
| • Tjóðpall Føroya | 105.000 kr. |
| • Dramaverkstaðið | 25.000 kr. |

Sum nevnt frammanfyri, fær Tjóðpallur Føroya stuðul sum "rakstrarjáttan" og stuðul frá øðrum játtanum á fíggjarlógini.

# 9 Menning av mentan og mentanararvi 7.24.3.20.

## 9.1 Endamál

Játtanin 339 t.kr. verður sambært viðmerkingunum á fíggjarlógini “*nýtt í samráð við søvnini til ymisk menningararbeiðir og verkætlanir. Mentamálaráðið umsitur játtanina.*”

## 9.2 Stuðulsmóttakarar

Sambært Búskaparskipan Landsins er í 2006 m.a. veittur stuðul til:

| | |
|---|---|
| • Føroya Fornminnissavn | 169.000 kr. |
| • Føroya Landsskjalasavn | 24.158 kr. |
| • Listasavn Føroya | 88.000 kr. |
| • Føroya Náttúrugripasavn | 50.000 kr. |

Sum nevnt frammanfyri, fær Listasavn Føroya stuðul sum “rakstrarjáttan” og stuðul frá øðrum játtanum á fíggjarlógini.

Føroya Fornminnissavn, Føroya Landsskjalasavn og Føroya Náttúrugripasavn eru landsstovnar og eru á fíggjarlógini, við “rakstrarjáttan”.

# 10 Hugasamband Føroya 7.24.6.08.

## 10.1 Endamál

Játtanin 325 t.kr. er sambært viðmerkingunum á fíggjarlógini til "*Hugasamband Føroya, ið er nýtt sersamband, sum Talvsamband Føroya og Bridgesamband Føroya hava stovnsett. Játtanin er stuðul hjá hesum báðum sambondum fyri at stuðla undir teirra virksemi, bæði her heima, til verksetan av kappingum í Føroyum og til luttøku í kappingum í altjóða høpi. Játtanin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m.*".

## 10.2 Stuðulsmóttakarar

Sambært roknskapinum hjá Hugasambandinum er stuðulin rindaður víðari til:

| | |
|---|---|
| - Talvsamband Føroya | 225.000 kr. |
| - Bridgesamband Føroya | 100.000 kr. |

Talvsamband Føroya

Sambært roknskapinum 2006 fekk Talvsambandið 225 t.kr. frá Hugasambandi Føroya.

Sum víst á frammanfyri, undir "Tiltøk fyri børn og ung", fekk Talvsamband Føroya í 2006 80 t.kr. av veddingarpengunum til ein talvráðgeva.

Talvsamband Føroya fekk eisini í 2006 159 t.kr. til ein talvráðgeva, umvegis høvuðskontu 7.23.20.1. "Fólkaskúlin".

Sambært roknskapunum hevði Talvsamband Føroya í 2005 og 2006 avlop, ávikavist 17 t.kr. og 61 t.kr. Sambært roknskapinum 2006 hevur Talvsamband Føroya eina eginogn 187 t.kr. Avlopið av studningsjáttanunum tykist sostatt verða nýtt til at samla upp pening. ***14) Vit hava biðið um viðmerkingar frá landsstýrismanninum***.

# 11 Ítróttaanlegg 7.24.6.12

## 11.1 Endamál

Játtanin 1.867 t.kr. er sambært viðmerkingunum á fíggjarlógini "*stuðul til ítróttaanlegg. Íroknað játtanina eru 350 t.kr., ið eru ætlaðar sum ein ískoytisstuðul til serligar sparkivallir, ið Fótbóltssambandið fíggjar við UEFA-stuðli, saman við kommununum. Verkætlanin byrjaði í 2005 og heldur fram í 2006. Í 2006 er játtanin hækkað við 800 t.kr., ætlað til ítróttahallir.*"

## 11.2 Stuðulsmóttakarar

Sambært Búskaparskipan Landsins er stuðul í 2006 veittur til:

| | | |
|---|---|---|
| Fótbóltssambandið | kr. 350.000 | til sparkivallir |
| Føroyskt Íslandsrossafelag | kr. 139.250 | til bygging av ríðihøll í Havnardali |
| **Tilsamans** | **kr. 489.250** | |

Fótbóltssambandið

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina eru í 2007 350 t.kr. játtaðar til sparkivallir. Fótbóltssambandið fekk eisini 350 t.kr. til sparkivallir í 2005.

Føroyskt Íslandsrossafelag

Føroyskt Íslandsrossafelag fekk eisini 700 t.kr. í 2004 í stuðli til ríðihøllina.

## 11.3 Stuðulstreytir

Vit hava spurt, hvørjar treytir eru fyri stuðlinum. Landsstýrismaðurin vísir til eitt skjal, ið Fíggjarmálaráðið/Landsarkitekturin hevur gjørt í oktober 2000. Heitið á skjalinum er "Stutt vegleiðing, tá ið søkt verður studning".

Umsóknin skal fevna um:

1. Skrivlig grundgeving fyri, at søkt verður um studning.
2. Skrivlig lýsing av verkætlanini.
3. Viðtøkur fyri felagið.
4. Útgreinaða kostnaðameting og fíggjarætlan. MVG skal vera íroknað upphæddunum. Er talan um fleiri byggistig, skal tað vera útgreinað og kostnaðarmeting vera fyri gjørd fyri hvørt byggistig.
5. Skrivlig váttan frá peningastovnum og øðrum um lán og annan fíggjarligan stuðul.
6. Tekningar, sum lýsa verkætlanina (støðumynd, flatmynd av øllum hæddum, síðumyndir og skurður við tilfarslýsing).
7. Skrivlig góðkenning av verkætlanini frá Brunaumsjón Landsins. Um søkt verður um studning til bygning, sum eisini verður at nýta til samkomu, skal skrivlig góðkenning útvegast frá Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum.
8. Umsóknin skal greitt vísa til tey skjøl, tekningar og annað, sum verður hjálagt umsóknini.
9. Øll skjøl skulu verða undirskrivað og dagfest ella á annan hátt frámerkt.
10. Verður studningur játtaður, skal hann verða latin til ta verkætlan, sum lýst er í umsóknini, og verður hann roknaður í mun til kostnaðarmetingina. Studningur verður ikki latin til møguligan meirkostnað.

11. Arbeiðið má ikki setast í verk, áðrenn skrivlig tilsøgn um studning er givin.
12. Tá arbeiðið er liðugt, verður skrivlig umbøn um útgjald av studningi at senda Mentamálaráðnum. Grannskoðaður byggiroknskapur skal latast inn til góðkenningar saman við umbønini. Stuðulin verður goldin út, tá ið arbeiðið er sýnað og góðkent av Landsarkitektinum.
13. Ávegis studningur kann gjaldast út eftir skrivligari umbøn, hjálagt grannskoðaðan roknskap fyri ávegis arbeiðinum. Arbeiðið skal sýnast og góðkennast av Landsverki.
14. Ávegis studningur verður í mesta lagi 60% av samlaða studninginum.

Umsókn, umbøn um útgjald og onnur skriv skulu sendast til: Mentamálaráðið, Hoyvíksvegur 72, 100 Tórshavn.

***15) Vit hava spurt, um Mentamálaráðið í øllum lutum hevur fylgt hesari vegleiðing seinastu 7 árini.***

# 12 Viðmerkingar

## 12.1 Alment um studningslóggávu

Landsgrannskoðanin hevur seinastu árini víst á, at tað er góður lóggávusiður, at neyvari reglur um studningsskipanir, sum venda sær til ein breiðan umsøkjaraskara, verða ásettar í serstakari lóg við m.ø.:

1. Neyvari endamálsáseting í lógini. Í viðmerkingunum: ítøkiligar ásetingar fyri, hvørji úrslit/eyðkenni kunnu nýtast sum mát fyri, um endamálið er rokkið.
2. Lýsing/avmarkan av, hvør kann fáa stuðul, hvussu stuðulin verður roknaður út, og hvussu stór samlaða stuðulsupphæddin er, vísandi til fíggjarlóg.
3. Reglur fyri, hvussu og nær stuðulin verður goldin út.
4. Heimild í lógini at áseta reglur fyri viðgerð og góðkenning av umsóknum, krøv til skjalprógv, treytir fyri játtan og nýtslu av stuðuli.
5. Heimild í lógini at krevja, at einstaklingar, feløg ella viðtøkur fyri sjálvsognarstovnar o.l., skulu lúka ávís krøv/góðkennast, sum treyt fyri stuðuli.
6. Heimild í lógini at áseta neyvari treytir og reglur viðvíkjandi fíggjarætlan, eftirliti, roknskapum og grannskoðan.
7. Ásetingar í lógini um, at ein tilsøgn um stuðul fellur burtur, ella stuðulin skal verða rindaður aftur, lýkur móttakarin ikki longur settar treytir, ella megnar ikki at fullføra eina ætlan innan ásetta tíð.
8. Upplýsingarskyldu og atgongd til kanningar á staðnum.
9. Møguligar revsireglur.

Umrøddu trupulleikar viðvíkjandi stuðulsumsiting er ikki eitt serstakt fyribrigdi hjá landsstýrismanninum í mentamálum, og í samráð við fleiri aðalráð átók Landsgrannskoðanin sær í september 2001 at skipa fyri einum skeiði í "umsiting av stuðulsjáttanum o.a.".

Síðani 2002 hevur m.a. Fíggjarmálaráðið og síðani ein serkøn nevnd, sett av Formansskapi Løgtingsins, arbeitt við at evna til eina játtanarlóg og í hesum sambandi eisini almennar lógarásetingar um studning úr landskassanum, og umrøtt hevur eisini verið at bøta um viðmerkingarnar á fíggjarlógini.

Í mars 2006 legði løgtingsformaðurin síðani fram uppskot til løgtingslóg "um landsins játtanarskipan" (Lm. nr. 81/2005). Ætlanin við uppskotinum var eisini at útvega heimild til at áseta neyvari reglur "til tess at tryggja skynsama stuðulsumsiting." Lógaruppskotið kom ikki aftur úr nevnd, áðrenn Løgtingið fór heim í mai 2006, og fall burtur.

Landsgrannskoðanin heitti í oktober 2006 til fánýtis á Formansskap Løgtingsins um at reisa málið av nýggjum.

## 12.2 Alment um studningsumsiting

Ein stórur partur av studninginum til mentan og ítrótt eru veddingarpengar frá Dansk Tipstjeneste A/S. Sum víst á frammanfyri, kom lógin um veddingarpengar í gildi í apríl 1999 og hevur sostatt virkað í 8 ár. Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir víst á, at tað ikki er nøktandi, at føroyska heimastýrið ikki enn hevur ásett *"nærmere regler om regnskabsaflæggelse og revision"*, og at ongar ætlanir eru um at áseta tílíkar reglur.

Síðani 2002 hevur Mentamálaráðið bøtt um umsitingina á ymiskan hátt við leiðreglum o.ø., men sum víst á, er endamálið við stuðlinum oftast sera breitt orðað, og ikki er ásett, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um

endamálið við studninginum er rokkið. Gjøllari krøv til roknskaparførslu og grannskoðan eru ikki ásett. Samanumtikið kunnu vit tí í 2007 endurtaka fleiri av viðmerkingum okkara frá 2002:

> "Nógvu studningsjáttanirnar, sum politiski myndugleikin (landsstýrismaðurin) umsitur, eru bert lýstar við fáum orðum í viðmerkingum til fíggjarlógina. Summar játtanir eru til meginfeløg, sum síðani umsita studning til undirliggjandi feløg, ofta uttan neyvari ásetingar frá landsstýrismanninum. Fleiri játtanir fevna um at kalla sama breiða endamál og sama umsøkjaraskara.
>
> Fleiri stovnar/feløg kunnu fáa studning til somu endamál frá meginfeløgum, umframt frá stuðulsjáttanum, ið landsstýrismaðurin umsitur.
>
> Umsitingin av studningi til mentanarendamál tykist sum heild fløkt og óskipað og er eisini merkt av tvørrandi heimild at áseta greið og einsháttað krøv, í sambandi við málsviðgerð og útgjalding av studningi. Í ávísan mun er talan um fleirfalda málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál.
>
> Eftir okkara tykki er tørvur á eini sanering/upprudding viðvíkjandi stuðulsgrundarlagi/-lóggávu og stuðulsumsitingini, so endamál og treytir o.a. verða greiðari."

Í september 2007 ásannaði landsstýrismaðurin, "*at studningsumsitingin kann virka ógreið, og Mentamálaráðið kann vera samt í, at endamálini við ymsu studningsjáttanunum kundu verið neyvari lýst. Viðvíkjandi fleirfaldari málsviðgerð duga vit í verandi skipan ikki at síggja, hvussu hetta kann umgangast. Umsøkjarar hava rætt til at fáa stuðul bæði frá Mentamálaráðnum og t.d. Mentanargrunninum ella ymsum feløgum til sama tiltak, og vit hava hvør sína umsiting.*"

Fleiri studningsjáttanir, sum Mentamálaráðið varðar av, verða latnar øðrum at umsita. Eins og vit áður hava víst á, hevur Mentamálaráðið ikki í øllum førum ásett leiðreglur ella treytir fyri, hvussu hesi feløg skuldu umsita studningin, t.d. reglur um fíggjarætlan, eftirlit, roknskaparhald og grannskoðan.

Gjøgnumgongdin av útgjaldingum í 2006 hevur eisini víst, at tað framvegis í nógvum førum kemur fyri, at stuðul verður veittur til landsstovnar ella stovnar/feløg, ið frammanundan fáa stuðul sum "rakstrarjáttan" ella stuðul frá øðrum játtanum á løgtingsfíggjarlógini.

Í nøkrum førum er talan um studning til eina ávísa verkætlan, ið avvarðandi stovnur umsitur. Men í øðrum førum tykist tað vera óskipað og kanska óneyðugt at veita studning til ein almennan stovn ella felag, ið fær stuðul frá nógvum játtanum.

Í oktober 2007 vísir landsstýrismaðurin á, at Mentamálaráðið strembar eftir ikki at veita stuðul til feløg og stovnar, ið longu fáa stuðul á fíggjarlógini. Tó verða ávísar verkætlanir, ið fella uttanfyri raksturin hjá felagnum, stuðlaðar, um hildið verður, at verkætlanin eigur at verða framd, og ikki ber seg fíggjarliga uttan stuðul frá Mentamálaráðnum.

## 12.3 <u>Skattlig viðurskifti</u>

Mentamálaráðið rindar stuðul til eftirútbúgving, førleikamenning, konsertferð, skeið, tónleikalesnað o.a. inn á bankakontu hjá umsøkjara, uttan um skattaskipanina. Landsgrannskoðanin hevur víst á, at henda mannagongd tykist ikki vera samsvarandi ásetingunum í § 60 í skattalógini um A-inntøku.

Mentamálaráðið hevur í september 2007 m.a. greitt frá eini avtalu, har Toll- og Skattstovu Føroya frá Mentamálaráðnum fær upplýsingar um, hvørji stovnsnummur Mentamálaráðið letur stuðul til, og Toll- og Skattstovu Føroya fær heimild at lesa øll bókingarskjøl á hesum stovnsnumrum.

Landsgrannskoðanin ivast í, um avtalan/mannagongdin hevur nakra lógarheimild, í teimum førum talan er um studning, ið er at rokna sum A-inntøku smb. § 60, stk. 1, nr. 6, í skattalógini. Hetta tí, at smb. § 63 skal, áðrenn A-inntøka verður goldin skatt-

gjaldara, A-skattur verða avroknaður í upphæddini. Arbeiðsgevarin skal gjalda A-inntøkuna til eitt av landsstýrinum góðkent avrokningarstað.

Landsgrannskoðanin hevur í oktober 2007 umrøtt málið við leiðsluna á Toll- og Skattstovu Føroya, sum eisini sigur seg ivast í, um manngongdin er røtt, og vit hava mælt landsstýrismanninum til at viðgera spurningin av nýggjum.

Vit hava áður reist sama spurning í sambandi við studning úr Mentanargrunninum.

Í frágreiðingini hava vit eisini víst á, at sambært átekning í roknskapinum hjá Føroya Symfoniorkestri er endurgjald til ferðir, samsýningar o.a. óskattað. Henda mannagongd tykist heldur ikki vera samsvarandi ásetingunum í § 60 í skattalógini um A-inntøku.